**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

*Skrásetingar nr.:*
**L-A007-1**

# Leiðbeining um fyrstuhjálparútgerð

Í løgtingslóg um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974, er í § 22 ásett: "Í virkjum og í arbeiði, sum er undir hesi lóg, skulu eftir eftirlitsins ætlan verða tørvandi ráð til handa til fyrstuhjálp í vanlukku-tilburði, eins og eftirlitið kann treyta tilgerð av serstakari skaðastovu í størri virkjum, um tað verður hildi tørvandi at vera."

**Viðmerkingar.**
Á arbeiðsplássum skal verða nóg mikið av fyrstuhjálparkassum, og skulu hesir altíð verða fyltir upp og verða lætt atkomuligir.
Umbindingarevni skal verða nóg mikið av til at klára dagsins smásár og skursl. Pakkar sum eru opnaðir og ikki sterilir meira, skulu burturbeinast.
Arbeiðseftirlitið kann krevja, at minst eitt av starvsfólkunum hava tikið fyrstuhjálparskeið, har fleiri enn 20 fólk starvast.
Arbeiðseftirlitið kann krevja, at børur eru á staðnum, har fleiri enn 20 fólk starvast t.d. í grót-brotum, kolanámum, tunnilsarbeiði, entreprenørarbeiði og á byggiplássum.
Góðkend skeltir skulu vísa, hvar fyrstuhjálparkassar, møguligar børur og skaðastova er at finna.

**Í fyrstuhjálparkassum, sum Arbeiðseftirlitið fyriskrivar, skulu vera:**
10 sterilar gazekompressir (samanlagt gaze 10 x 10 cm).
2 kompressumbindingar 1 (gaze/vattkompress 80 x 100 mm, seymað fast á eitt gazebind, sum er 4 m x 8 cm).
1 rulla av heftiplástur (1,25 cm x 5 m).
1 rulla av heftiplástur (2,5 cm x 1 m).
1 plásturumbinding (6 cm x 1 m).
1 saksur
1 pinsett
1 dós av smáum heftiplástrum.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ,** hin 11. apríl 1988.
Eli Davidsen, stjóri (sign.)

***Lógarheimild:***
§ 22 í løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.

***Útgivið fyrstu ferð:***
**11. apríl 1988**

***Seinastu broytingar:***